Fráfaringaraldurin fer upp í 70 ár:

# Landsstýrismaðurin strikar krepputiltak

**Almenn starvsfólk kunnu nú velja at halda fram í starvinum, til tey verða 70 ár. - Í eini tíð, har arbeiðsgevarar sóknast eftir arbeiðsmegi, er rætt og rímiligt, at tey, sum hava hug at halda fram á arbeiðsmarknaðinum eftir 67 ára aldur, fáa tann møguleikan, sigur Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum**

PENSJÓNSALDUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Við virknaði frá 1. november 2007 fer fráfaringaraldurin hjá sáttmálasettum starvsfólkum innan hitt almenna úr 67 árum upp í 70 ár. Hetta er ásett í einum nýggjum rundskrivi úr Fíggjarmálaráðnum.

Í stuttum ber broytingin í sær, at sáttmálasett starvsfólk hjá tí almenna eftir nevnda dag kunnu halda fram í starvi, til tey verða 70 ár. Hinvegin hava starvsfólk sjálvandi framvegis rætt at fara frá fyri aldur, tá ið tey eru vorðin 67 ár.

- Í einari tíð, har bæði almenni og privati arbeiðsmarknaðurin hava brúk fyri arbeiðsmegi, er rætt at hækka fráfaringaraldurin. Starvsfólk, sum hava holla vitan og hava hug at halda fram á arbeiðsmarknaðinum, eftir at tey eru vorðin 67 ár, skulu fáa tann møguleikan, sigur Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Tað var í kreppuárunum, tá ið nógv gingu arbeiðsleys, at almenni fráfaringaraldurin fór niður í 67 ár. Orsøkin var fyrst og fremst, at landsstýrið vildi varðveita tey yngru starvsfólkini á arbeiðsmarknaðinum og í landinum.

- Nú fara vit øvugta vegin og strika eitt krepputiltak, ið ikki longur gevur meining, sigur Magni Laksáfoss, ið vísir á, at tey, sum velja at brúka nýggja møguleikan, varðveita grundupphæddina í fólkapensjónini, hóast tey eru til arbeiðis.

Landsstýrismaðurin vónar, at fleiri fara at brúka møguleikan, ið nú stendur opin. Eisini mælir hann stovnum hjá tí almenna til at laga seniorpolitikkin soleiðis, at eldri starvsfólk kunnu halda fram at arbeiða eftir 67 ára aldur, eitt nú niðursetta tíð.

# Lívsjáttandi fyri pensjónistarnar

**Landsfelag Pensjónistanna fegnast um, at almenn fráfaringaraldur er fluttur ú 67 árum upp í 70 ár**

PENSJÓN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Niclas Akraberg Poulsen, formaður í Landsfelag Pensjónistanna*

- Tað er gleðiligt, at pensjónistar nú kunnu velja, um teir fara frá tá tey fylla 67 ár, ella at halda fram til tey fylla 70 ár. Hetta sigur Niclas Akraberg Poulsen, sum er formaður í Landsfelag Pensjónistanna.

Niklas Akraberg Poulsen segði við Rás 2 á middegi, at hetta er lívsjáttandi hjá fleiri pensjónistar, sum fegnir vilja halda fram í starvi, tó at tey eru vorðin 67 ár.

- Hetta skapar trupulleikar hjá fleiri pensjónistum, tá tey nærkast teimu 67 árunum – hetta kann viðføra eitt sálarligt trýst, tá tú nærkast tí degi, tá boðini eru, at "nú er ikki brúk fyri tær longur...". Vit hava spurt, hví vit skulu revast, tá vit fylla 67 ár, vísir Niclas Akraberg Poulsen á. Niclas Akraberg Poulsen kundi sjávlur fara úr starvi sum 60 ára gamal. Hann var løgreglumaður. Teir kunnu kortini halda fram, til teir eru 63, men tá mugu teir úr starvi, greiddi Niclas Akraberg Poulsen frá, meðan hann var á fjalli suðuri í Þorkeri á middegi í.

Starvslýsing



Meginskrivstovan

## Spennandi starv sum fíggjarfulltrúi í Nærverkinum

Nærverkið søkir fíggjarfulltrúa til Meginskrivstovuna at byrja skjótast gjørligt. Talan er um eitt nýtt, sjálvstøðugt og avbjóðandi starv, har tú fert at arbeiða í einum dynamiskum toymi saman við tveimum øðrum fíggjarfulltrúum.

Nærverkið er við sínum 1400 starvsfólkum eitt tað størsta arbeiðsplássið í Føroyum, og vit reka virksemi fyri uml. 460 mió. kr. árliga. Nærverkið er í støðugum vøkstri, og stórar uppgávur innan fíggjarøkið liggja fyri framman.

**Førleikar:**
Tørvur er tí á einum fíggjarkønum persóni við hegni til at skapa framtíðarloysnir, og sum evnar at framleiða vitan sum grundarlag fyri støðutakan og leiðslukunning.
Viðkomandi útbúgving frá hægri læristovni er ein fyrimunur. Harafturat hevur tú royndir innan fíggjarstýring, ert álítandi og nærlagdur, og tú dugir væl at orða teg skrivliga á føroyskum.

Starvið er skipað við beinleiðis tilvísing til stjóran í Nærverkinum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Nærverkið, tænastustaðurin í løtuni er Meginskrivstovan. Meiri fæst at vita við at venda sær til Mary J. í Garði, stjóra, á tlf. 36 00 00.

**Umsøkn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: Mary J. í Garði, stjóri

**Umsóknarfreist:** 22. oktober 2007

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

sansir.fo

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 36 00 00, Faks 36 00 01, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**